## Vátt í Reykjavík

Tað hevur regnað óvanliga illa í Reykjavík í seinastuni. Veðurfrøðingurin Einar Sveinbjørnsson sigur við Morgunblaðið, at í veruleikanum hevur tað regnað næstan uttan íhald síðani miðjan august, og at tað, sum er farið av oktober, hevur avfallið verið um 100 millimetrar. So illa hevur tað ikki regnað í Reykjavík síðani 1993, sigur Einar Sveinbjørnsson. Tað árið máldi veðurstøðin avfallið í býnum til 260 millimetrar í november mánaði.



## Tíðin er búgvin til ein palestinskan stat

Tíðin er búgvin til at stovna ein palestinskan stat. Hetta heldur amerikanski uttanríkisráðharrin; Condeleeza Rice. Hetta sigur Condeleeza Rice í einum felags pressuskrivi, saman við palestinska forsetanum; Mahmoud Abbas. Stríðið millum palestinar og ísraelar hevur hægstu raðfesting hjá George W. Bush forseta. Condeleeza Rice heldur, at stríðandi partarnir arbeiða harðari uppá at fáa frið í lag, enn teir hava gjørt í nógv ár. Í november verður ein friðar-konferansa, sum skal haldast í Annapolis í USA.

# Tungu akførini út um býin



*Á hesum stykkinum uppi á Skarðshjalla skulu gerast 16 parkeringspláss til lastbilar og bussar*

**Tórshavnar Býráð fer nú undir at gera parkeringsøki til tungu og dálkandi ferðsluna uppi á Skarðshjalla**

PARKERING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað hevur í longri tíð verið arbeitt við einari ætlan at flyta alla ta tungu ferðsluna út um býin, eisini tá talan er um parkering. Hetta stavar frá einum ynski um, at stórir og tungir lastbilar ikki skulu verða parkeraðir húsanna millum til ampa fyri bæði fólk og ferðslu.

Eisini hetta uppskotið er gamalt og stavar frá 2004, tá skjøtil varð settur á. Í mars 2005 samtykti fíggjarnevndin at taka undir við hugsanini at gera hetta parkeringsplássið uppi á Skarðshjalla oman fyri har, sum ídnaðarøkið á Hjalla er.

Samtykt varð í september hetta árið, at keypa eitt 2350 fermetrar stórt stykki fyri smáar 1,5 milliónir krónur.

Men tað er kortini ikki bara sum at siga tað at byggja nakað, sjálvt um tað so bara er eitt parkeringspláss. Tí sambært Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og løgtingslóg um umhvørvisvernd, kemur hetta undir »serliga dálkandi virki v. m.«, og tí er neyðugt at gera eyka íløgur og fyriskipanir, áðrenn parkeringsøkið verður umhvørvisliga góðkent.

Tískil hevur verið neyðugt at írokna í uppskotið regnvatnsleiðingar, oljuútskiljara við tilhoyri, umframt fínplanering, asfaltering og stríping.

### Klárt at byrja

Í uppskotinum liggur, at pláss skal verða fyri 16 lastbilum og bussum upp til tólv metra longd, sum skulu setast í uppstrikaðar básar.

Samstundis verður mælt til, at kunngerðin um parkering í kommununi verður dagførd. Í hesum sambandi hevur Finn Ougaard, varafúti, gjørt sínar viðmerkingar.

Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskotinum, og sama gjørdi tekniska nevnd á fundi 7. september í fjør. Viku seinni samtykti fíggjarnevndin at taka undir við teknisku nevnd og játta 800.000 krónur til arbeiðið. Tó mælir fíggjarnevndin frá at seta tíðaravmarkaða parkering í gildi fyri økið.

Nakað seinni samtykti býráðið viðmælini og bjóðar arbeiðið út í innbodnari lisitatión millum tríggjar arbeiðstakarar.

Síðst í september í ár hevur tekniska nevnd fund um málið og samtykkir at taka av lægsta tilboðnum, sum er frá Sp/f Maskinkoyring, og ljóðar upp á 1.071.746,06 krónur – uttan MVG.

Fíggjarnevndin samtykti at játta 527.000 krónur aftrat teimum framman undan játtaðu 800.000 krónunum, og mælti anars býráðnum til at taka undir við málinum. Og tað gjørdi býráðið so í síðstu viku soleiðis, at nú er klárt at fara undir arbeiðið.

# Betur framkomandi á Stórheyggi



*Her sunnantil við fimleikarhøllina á Stórheyggi skulu byggjast 32 nýggj parkeringspláss*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ótryggu ferðsluviðurskiftini við fimleikarhøllina á Stórheyggi skulu nú komast til lívs við 32 nýggjum parkeringsplássum**

PARKERING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein gamal dreymur gerst nú veruleiki.

Heilt afturi í september 1999 heitti Niels Nattestad á Tórshavnar Kommunu um at fáa nøktandi viðurskifti við fimleikarhøllina á Stórheyggi, við neyðugum parkeringsviðurskiftum.

Ferðslunevndin tók tá beinanvegin undir við hugskotinum, og mælti umframt til, at rekkverk varð sett upp við høvuðsinngongdina. Um miðan ár 2000 samtykti tekniska nevnd at beina málið í mentamálanevndina.

Men har steðgaði málið upp, tí sambært fundarfrágreiðing býráðsins fær mentamálanevndin ikki málið fyrr enn 19. februar 2004.

Tá mæltu trivnaðarstjórin og deildarleiðarin í mentamálum mentamálanevndini til, at tekniska umsitingin, sum umsitur ferðsluspurningar, arbeiðir víðari við áheitanini hjá skúlastjóranum, so fleiri parkeringspláss verða við fimleikarhøllina.

Umsitingin hevur síðani gjørt kostnaðarmeting, og trý uppskot um parkeringsøki eru at velja ímillum. Samtykt er at taka av uppskotinum hjá Sp/f Preben Hansen, sum umfatar 32 parkeringspláss.

Býráðið samtykti í síðstu viku at játta 90.000 krónur til projektering og eftirlit, og arbeiðið verður nú boðið út.